# Adventkirkjan

Islam fyrilestrar við Børge Schantz



*Mánadagin 27. mars kl. 19.30*
*í Miðlahúsinum í Vágsbotni*

**Muhammed, Islams profetur**

- Samtíð profetsins, lív og hjúnalag
- Islams fimm súlur og fimm lærusetningar
- Bøkur hjá muslimum: Koranin og Hadith
- Útbreiðslan av Islam

*Týsdagin 28. mars kl. 19.30*
*í Miðlahúsinum í Vágsbotni*

**Strangar lógir og strangir siðir**

- Tann guddómliga Shari'ah við hørðum revsingum
- Rættindi og avmarkingar hjá muslimskum kvinnum
- Leikluturin hjá konuni (eisini tí kristnu) í einum muslimskum hjúnalagi
- Matlógir í Islam. Samveruháttir

*Mikudagin 29. mars kl. 19.30*
*í Adventkirkjuni, Hoyvíksvegur 56*

**Trupul sameksistensur millum kristin og muslimar**

- Trúarfrælsi og fundamentalisma
- Tær djúptøknu og afturvendandi ósemjur millum vesturlendskar lógir og Shari'ahen
- "Snórbeina gøtan" við treytum fyri atgongd til Paradísi

*Hósdagin 30. mars kl. 19.30*
*í Adventkirkjuni, Hoyvíksvegur 56*

**Kreppustøður sum ikki slepst undan**

- Muhammedtekningarnar: Tann sjónliga orsøkin og tær fjaldu dagsskráirnar
- Útjaðaramørk talufrælsisins og ábyrgd
- Muslimar skipast í bólkar við ósamsvarandi ætlanum
- Neilig og jalig úrslit í ósemjuni um Muhammedtekningarnar

Adventistakirkjan

# Pedagogur/ stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulspedagogi til eina familju við tveimum børnum í Fuglafjarðar kommunu, at byrja skjótast gjørligt.

Endamálið við stuðlinum er í samstarvi við barnaverndarnevndina og foreldrini, at hjálpa í heiminum og at vera um børnini.

Arbeiðsstaðurin er í heiminum hjá familjuni.

Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna og starvið verður sett fram til 30. juni 2006.

Ynskiligt er at tann ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Irenu Olsen, sosialdeildarleiðara á tlf. 44 50 06/21 08 06.

Umsóknir við møguligum avritum av prógvi verða at senda Barnaverndini í seinasta lagi mánadagin tann 3. apríl.

**Fuglafjarðar býráð**
**Barnaverndarnevndin**
**Norður í Gerði 10**
**530 Fuglafjørður**






**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2423,** P/F Nornagestur, 210 Sandur.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Birgir Livar Magni Hjalt Nicodemussen, 210 Sandur (nevndarformaður) Niels Hjalt Nicodemussen, 210 Sandur (nevndarlimur) Edvard Hjalt Nicodemussen, 210 Sandur (nevndarlimur)
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Edvard Hjalt Nicodemussen, 210 Sandur
**Innkomin sum likvidator:** Páll Nielsen, adv., Skansavegur 1, 110 Tórshavn
**Átekning:** Felagið er tann 15.03.2006 farið í sjálvbodna likvidatión

*Skráseting Føroya*
*tann 21. mars 2006*

*Kristin Balle*




# Leyst starv

## Málsviðgeri til Byggi- og býarskipanardeildina

Søkt verður eftir starvsfólki við tekniskari útbúgving til byggimálsviðgerð o.a. Talan er um eitt fulltíðarstarv á byggi- og býarskipanardeildini.

Høvuðsuppgávur verða byggimálsviðgerð og samskifti við borgarar, feløg og stovnar.

**Førleikaprógv**
Umsøkjarin skal vera útbúgvin tekniskt hjálparfólk, byggiteknikari, ella hava aðra viðkomandi útbúgving. Umsøkjarin skal duga væl føroyskt og helst hava kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/MicroStation.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Magna Dalsgaard, leiðara ella Mikael Viderø, býararkitekt, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. apríl 2006.

Viðmerk á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**


# BRÁ & STANLEY

## LEYGARDAGIN 25. MARS ER OPIÐ TIL KL. 17.00

**NÓGV NÝTT HEIMKOMIÐ**

**BRÁ við Streymin tel 42 27 27**
**STANLEY Norðskála tel 42 22 70**






Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo


## STARVSFÓLK SØKIST TIL SØLUDEILD OKKARA

Starvið umfatar sølu av øllum tí, ein el-innleggjari hevur tørv á.

Tað er neyðugt at hava útbúgving sum elektrikari. Kunnleiki innan handil er ein fyrimunur.

Dentur verður lagdur á, at tú dugir væl at samskifta.

Afturfyri bjóða vit, at tú fært eitt spennandi starv

Umsókn verður at senda til:

**solar FØROYAR**

Brekkutún 2 · Hoyvík · Postsmoga 105 · Att.: Finn Jørgensen
Tel 35 79 33 · solar@solar.fo